# Fóðraði ungar gentur við hassji

**Málið móti einum 53 ára gomlum manni, sum er ákærdur fyri í fleiri ferum at hava selt hassj, er tikið upp til dóms. Ákærin helt tað vera herðandi umstøður, at maðurin fleiri ofta hevur latið blaðungar gentur fáa hassj frá sær**

Randi Jacobsen



*Ákærin helt tað álvarsligasta vera, at maðurin læt blaðungar gentur fáa hassj*

53 ára gamli klaksvíkingurin, sum var í Føroya Rætti mikudagin, varð av ákæranum útnevndur at vera eitt slag av stórum millumhandlara við hassji.

Hann varð handtikin 13. januar, húsarannsókn varð gjørd heima hjá honum, og dagin eftir varð hann varðhaldfongslaður í fýra vikur. Síðan hevur varðhaldsfongslingin verið longd.

Mikudagin kom maðurin so fyri rættin.

### Stórbrúkari

Hann varð eisini handtikin í oktober ein dag, hann kom við flogfarinum úr Danmark. Í viðførinum hevði hann 156 gramm av hassji og fýra gramm av amfetamini.

Men áðrenn tað málið hjá honum kom fyri rættin, varð hann tikin aftur, í januar.

Mikudagin játtaði hann seg sekan í at hava smuglað rúsevnini til Føroya í oktober, og tað var alt til egna nýtslu, segði hann.

Ein onnur ákæra er í sambandi við, at 600 gramm av hassji, umframt amfetamin, hassjmiks og annað vórðu funnin í bilinum.

– Ja, men tað var til egna nýtslu, segði maðurin, sum ikki krógvaði, at hann var misnýtari.

### Seldi ofta

Hann er eisini ákærdur fyri at hava selt einum øðrum manni hassj fleiri ferðir bæði í Havn og í Klaksvík. Tann maðurin varð herfyri dømdur fyri keypini.

Hesin 53 ára gamli klaksvíkingurin noktar seg sekan í at hava selt. Í rættinum greiddi hann frá, at hin maðurin skavaði pening saman, gav sær, og fyri pengingin keypti hann honum hassj. Hin maðurin keypti ikki sjálvur, tí hann kendi ikki leverandørin. Klaksvíkingurin seg í rættinum, at tá ið hann keypti, fekk hann eina minni nøgd afturfyri frá leverandørinum, svarandi til umleið 10 prosent. Tann, sum er dømdur, hevur saman við politinum roknað seg fram til, at klaksvíkingurin hevur latið hinum umleið eitt kilo av hassji. So nógv var tað ikki, helt klaksvíkingurin.

### Til ungar gentur

Eisini er klaksvíkingurin ákærdur fyri at hava bjóðað hinum amfetamin, men hann tók ikki. Klaksvíkingurin noktaði hetta, men hin maðurin váttaði í rættinum, at hann hevði fingið tilboðið.

Hann er somuleiðis ákærdur fyri at hava latið tríggjar gentur fáa hassj. Tvær teirra eru ómyndugar.

Tvær teirra søgdu í rættinum, at tær fleiri ferðir høvdu verið heima hjá manninum og roykt hassj. Tær høvdu ikki goldið fyri tað. Hon hevði bæði fingið og keypt hassj frá manninum. Hon hevði eisini keypt amfetamin frá honum tríggjar ferðir. Amfetaminið kostaði 600 krónur grammið. Henda gentan hevði eisini verið við manninum í Havn eftir hassji.

### Altíð skeivur

Tann ákærdi varð spurdur, um hann hevði koyrt runt í bili sínum, tá ið hann var í Havn.

– Nei. Tá ið eg var í Havn, var eg altíð so skeivur, at eg kundi ikki koyra, segði maðurin.

Ákærin segði, at maðurin átti at fáa harðan dóm. Tað snúði seg um fleiri mál, og ákærin helt umstøðurnar vera herðandi, at maðurin hevði latið ómyndugar gentur fáa hassj. At tær høvdu fingið hassjið ókeypis, tulkaði hann sum, at hann roynd at fáa genturnar mundnar av rúsevnunum, so tær seinni fóru at keypa frá honum.

Minst átta mánaða fongsulrevsng helt ákærin vera hóskandi.

Verjin etti spurnartekn við stóru nøgdirnar. Tað var bara gitingar, segði hann og helt seks mánaða fongsulrevsing vera ríkiligt.

Dómur fellur í næstu viku.

Av tí at málið er liðugt kannað, varð maðurin latin leysur, tá ið rættarfundurin var av.

# Egholminnrás á Egholm

**Øll, sum eita Egholm í Føroyum, eru ættað av donsku oynni Egholm. Í summar fara tey at hava ættarveitslu á lítlu oynni**

Randi Jacobsen



*Øssur Egholm, sum hevur tikið stig til Egholmsveitsluna, var í gjár og vitjaði uttan fyri húsini, har Madam Egholm búði á Reyni í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Ættarveitslur eru ikki so sjáldsamar, men ættarveitslan, sum Egholmsættin í summar fr at halda, er ein søga fyri seg.

Alt byrjaði við, at Øssur Egholm, sum býr í Hornsyld millum Horsens og Vejle í Danmark, teknaði seg sum lim í einum Facebook-bólki. Bólkurin eitur "Bevar Egholm sum ø".

Øssur Egholm fór at at vitja oynna, sum liggur út fyri Aalborg, og hann tók undir við, at oyggin átti at fáa frið. Ein fýra sporaður motorvegur fer at spilla umhvørvið, helt hann.

Pápi hansara, Sverri Egholm var ættargranskari, og hann fann fram til, hvørjir eftirkomararnir vóru, síðan tann fyrsti ættarfaðirin flutti av oynni og fekk sær eftirnavnið Egholm.

Arbeiði hansara fekk Øssur Egholm at vísa ættargranskingini ans, og tað gav honum hugskotið at skipa fyri ættarveitslu fyri egholmunum á oynni Egholm.

- Eg geri tað eisini fyri at vísa á ørskapin við at gera hetta triðja vegasamabndið um Limfjørðin, sigur Øssur Egholm.

Hann er 10. ættarlið eftir Niels Sørensen Egholm, sum í 18. øld flutti av Egholm og fekk sær eftirnavnið Egholm.

### Garðurin til sølu

Egholmsættin stavar frá ættargarðinum Damgaard á Egholm í Limfjørðinum. Nú er garðurin til sølu fyri 4,5 mió. krónur. 38 hektarar av jørð hoyra til garðin. Garðurin er i ringum standi, og Øssur Egholm hevur ongar ætlanir um at keypa.

Hinvegin heldur hann tað verður stuttligt at vísa ættarfólkum sínum garðin.

Á oynni Egholm búgva 55 fólk. Tað tekur bara fimm minuttir at sigla til Aalborg, har børnini ganga í skúla, og tey flestu arbeiða. Nakað av landbúnaði er á oynni.

Ein handil er á oynni, og hesin handil er bara opin sunnudag.

### Minnisvarði skal reisast

Øssur Egholm hevur fingið byggiloyvi til at reisa ein minnisvarða á Egholm við ættartalvuni á. Rundan um skulu plantast hjálpirøtur úr Føroyum.

Ættarstevnan verður í døgunum frá 15. til 18. juli.

Sjálv veitslan verður 16. Juli. Veitslan verður fyri ættarfólkum og øðrum innbodnum. Onnur kunnu tó eisini koma við, um tey bara vilja gjalda.

Á Egholm kunnu gestirnir gista á gamla skúlanum, men tey tilkomnu vilja óivað heldur gista á Vestergård hotelli og skeiðsdepli á Egholm. Tað ber eisini til at gista á einum kampingplássi beint yvirav við Aalborg.